# Ársaðalfundur í P/F Atlantic Petroleum

Boðað verður við hesum til ársaðalfund í P/F Atlantic Petroleum at verða á Hotel Føroyum, við Oyggjarvegin 45, 100 Tórshavn **leygardagin tann 21. mars 2009 kl. 10.00** við hesi fundarskrá:

1. **Val av fundarstjóra.**
2. **Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári**
3. **Framløgu av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar**
4. **Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapin og ársfrágreiðing.** Nevnd felagsins mælir til, at hallið sambært góðkenda roknskapin verður flutt fram til næsta ár.
5. **Val av nevnd.** Tveir nevndarlimir standa fyri vali fyri eitt 2 ára skeið, nevniliga Poul Mohr og Petur Even Djurhuus. Nevndin skjýtur upp afturval.
6. **Val av grannskoðara, ið situr til næsti vanligi ársaðalfundur er lokin.** Grannskoðari felagsins er Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT løggilt grannskoðaravirki, R.C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn. Nevndin skjýtur upp afturval av verandi grannskoðara felagsins at sita til næsta ársaðalfund.
7. **Viðtøkubroytingar.**

Nevndin skjýtur upp fylgjandi viðtøkubroytingar:

**A) Skotið verður upp at innseta hesa nýggju § 3 D:**

***"§ 3 D***

***Stk. 1.***

*Nevnd felagsins hevur í tíðini til 31. desember 2010 heimild til - í einum ella fleiri umførum – at útskriva konvertibul skuldabrøv ella onnur konvertibul skuldainstrument fyri lánum upp til kr. 56.000.000, ið geva lánveitaranum heimild til at konvertera krav sítt um afturgjald til partapening í felagnum. Konvertibul skuldabrøv ella onnur konvertibul skuldainstrument kunnu verða útskrivaði uttan fortekningarrætt fyri verandi partaeigarar. Eftir nevndarinnar avgerð kann gjald fyri konvertibul skuldabrøv ella onnur konvertibul skuldainstrument fara fram í reiðum peningi, heilt ella lutvíst við mótrokning í aðrari skuld hjá felagnum til konvertibul skuldabrøv ella onnur konvertibul skuldainstrument ella í øðrum virðum enn reiðum peningi, herundir soleiðis,*

*at felagið í sambandi við útskrivingina av konvertiblum skuldabrøvum ella øðrum konvertiblum skuldainstrumentum ímóti viðurlagi í konvertiblum skuldabrøvum ella øðrum konvertiblum skuldainstrumentum yvirtekur annað verandi virki, virksemi ella felag ella partabrøv í øðrum felagi (fusión);*

*at felagið í sambandi við útskriving av konvertiblum skuldabrøvum ella øðrum konvertiblum skuldainstrumentum uttan viðurlag í konvertiblum skuldabrøvum ella øðrum konvertiblum skuldainstrumentum tekur við slíkum øðrum virðum.*

***Stk. 2.***

*Nevnd felagsins hevur heimild til at hækka partapening felagsins í sama mun um konvertering av konvertiblum skuldabrøvum ella øðrum konvertiblum skuldainstrumentum fer fram. Nevnd felagsins avgerð treytirnar í konvertiblu skuldabrøvunum og í øðrum konvertiblum skuldainstrumentum og treytirnar fyri tekning av partapeningi við konvertering av konvertiblum skuldabrøvunum ella øðrum konvertiblum skuldainstrumentum til partapening við støði í heimildini eftir hesi grein, tó við teirri avmarking at fyri nýtekning av nevnda partapeningi verða at galda hesar ásetingar:*

1. *Partapeningurin fær somu rættindi í felagnum sum verandi partapeningur;*
2. *Partabrøvini skulu ljóða uppá navn og eru negotiabul;*
3. *Partaeigararnir hava onga skyldu at lata partabrøv síni innloysa;*
4. *Fyri nýggju partabrøvini er eisini galdandi henda avmarking í ognar- og atkvøðurættinum til partabrøv í felagnum: Eingin partaeigari kann eiga meiri enn 20 % av partapeninginum í felagnum og eingin kann greiða atkvøðu á aðalfundi í felagnum við meiri enn 20 % av atkvøðunum. Løgfrøðiligir persónar, ið innanhýsis eru so tætt knýttir hvør at øðrum, at annar hevur avgerðandi ávirkan á viðurskiftini hjá hinum, verða at meta sum ein í mun til hesa ognar- og atkvøðuavmarking, soleiðis at hesir løgfrøðiligu persónar tilsamans bert kunnu eiga og greiða atkvøðu fyri í mesta lagi 20 % í partapeningi.*

   *Sum dømi um slíkt tætt tilknýti millum løgfrøðiligar persónar, ið fevnt er av hesi grein, kunnu nevnast:*
   - *innanhýsis viðurskifti millum partafeløg, ið eftir ásetingunum í § 2 í partafelagslógini eru at meta sum koncernbundin;*
   - *innanhýsis viðurskifti millum aðrar løgfrøðiligar persónar og partafeløg, har hesir aðrir løgfrøðiligu persónar eiga meiri enn ella hava rætt til at greiða atkvøðu fyri meiri enn 50 % av partapeninginum í partafelagnum;*
   - *innanhýsis viðurskifti millum almennar stovnar.*
5. *Partabrøvini eru til støðdar kr. 100,00 og multipla av hesum.*
6. *Nýtekning kann fara fram uttan fortekningsrætt fyri verandi partaeigarar.*

**B) Skotið verður upp at fremja hesar broytingar í § 3 stk. 1.:**

- **o at broyta talið "31. desembur 2009" til "31. desembur 2010"**
- **o at broyta talið "kr. 60.862.000" til "kr. 175.000.000"**
- **o skoyta hesa orðing uppí endan á § 3 stk. 1: *"Gjald fyri hækking av partapeninginum kann harumframt heilt ella lutvíst fara fram við konvertering av skuld hjá felagnum til partapening."***

  Í aðramáta verður § 3 óbroytt.

**Skotið verður soleiðis upp at nevnda § 3 í fullum líki fær hesa orðing:**

"Stk. 1.
Nevnd felagsins hevur í tíðini til 31. desembur 2010 heimild til í einum ella fleiri umførum við upp til kr. 175.000.000 at hækka partapening felagsins. Hækking av partapeninginum kann heilt ella lutvíst fara fram í øðrum virðum enn reiðum peningi, herundir soleiðis,
at felagið í sambandi við hækking í partapeninginum ímóti viðurlagi í partabrøvum yvirtekur annað verandi virki, virksemi ella felag ella partabrøv í øðrum felagi (fusión);
at felagið í sambandi við hækking í partapeninginum uttan viðurlag í partabrøvum tekur við slíkum øðrum virðum.
Gjald fyri hækking av partapeninginum kann harumframt heilt ella lutvíst fara fram við konvertering av skuld hjá felagnum til partapening.

**Stk. 2.**
Fyri nýtekning av partapeningi við heimild í hesi grein verða annars at galda hesar ásetingar:

1. Partapeningurin fær somu rættindi í felagnum sum verandi partapeningur;
2. Partabrøvini skulu ljóða uppá navn og eru negotiabul;
3. Partaeigararnir hava onga skyldu at lata partabrøv síni innloysa;

4.a. Fyri nýggju partabrøvini er eisini galdandi henda avmarking í ognar- og atkvøðurættinum til partabrøv í felagnum:
Eingin partaeigari kann eiga meiri enn 20 % av partapeninginum í felagnum og eingin kann greiða atkvøðu á aðalfundi í felagnum við meiri enn 20 % av atkvøðunum. Løgfrøðiligir persónar, ið innanhýsis eru so tætt knýttir hvør at øðrum, at annar hevur avgerðandi ávirkan á viðurskiftini hjá hinum, verða at meta sum ein í mun til hesa ognar- og atkvøðuavmarking, soleiðis at hesir løgfrøðiligu persónar tilsamans bert kunnu eiga og greiða atkvøðu fyri í mesta lagi 20 % í partapeningi.
Sum dømi um slíkt tætt tilknýti millum løgfrøðiligar persónar, ið fevnt er av hesi grein, kunnu nevnast:

- innanhýsis viðurskifti millum partafeløg, ið eftir ásetingunum í § 2 í partafelagslógini eru at meta sum koncernbundin;
- innanhýsis viðurskifti millum aðrar løgfrøðiligar persónar og partafeløg, har hesir aðrir løgfrøðiligu persónar eiga meiri enn ella hava rætt til at greiða atkvøðu fyri meiri enn 50 % av partapeninginum í partafelagnum;
- innanhýsis viðurskifti millum almennar stovnar.

5. Nýtekning kann fara fram uttan fortekningsrætt fyri verandi partaeigarar. Ongar avmarkingar galda í fortekningsrættinum hjá nýggja partapeninginum við kapitalhækkingum í felagnum í framtíðini frásæð tí, ið er tilskilað í pkt. 4.a.
6. Partabrøvini eru til støðdar kr. 100,00 og multipla av hesum.
7. Um boðið verður til tekningar av nýggjum partapeningi uttan fortekningarrætt fyri verandi partaeigarar, skal tekning fara fram til marknaðarvirði.
8. Við yvirtekning, ger nevnd felagsins frítt av, hvussu tann til tekningar innboðna partapeningsupphædd - ið ikki er teknað við støði í fortekningsrætti - skal býtast millum tey, ið boðið hava sær til at tekna."

- - - 0 - - -

Til samtyktar av uppskotunum til viðtøkubroyting krevst smb. § 30 stk. 3 og § 78 stk. 1 í partafelagslógini at uppskotið verður samtykt við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og av tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeninginum.

**8. Ymiskt**

- - - 0 - - -

**Bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum.**

Bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum fer fram umvegis heimasíðu felagsins www.petroleum.fo ella á skrivstovu felagsins Gongin 9, 100 Tórshavn ella á tlf nr. + 298 350 100 og/ella telefax nr. + 298 350 101. Seinasta freist fyri bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum er **týsdagin tann 17. mars 2009 kl. 16.00.**

Um so er, at tygum ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, hava tygum møguleika at geva øðrum skrivliga fulltrú til at møta tygara vegna. Á heimasíðu felagsins www.petroleum.fo, umframt á skrivstovu felagsins Gongin 9, 100 Tórshavn, kunnu tygum útvega tygum eitt fulltrúarskjal, sum kann nýtast í hesum sambandi.

**Ársroknskapurin 2008 og dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum.**

Ársroknskapurin 2008 við grannskoðaraátekning og ársfrágreiðing og dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum koma at liggja frammi á skrivstovu felagsins Gongin 9, 100 Tórshavn í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin.

**Partapeningur, atkvøðurættur og kontoførandi peningastovnur.**

Partapeningur felagsins er kr. 112.573.000 býttur sundur í partabrøv á kr. 100 og multipla av hesum.

Í § 5 stk. 1 í viðtøkunum er ásett, at partaeigararnir hava 1 atkvøðu fyri hvørjar kr. 100 teir eiga í partapeningi.

Í § 2 stk. 2 er ásett, at eingin partaeigari kann greiða atkvøðu á aðalfundi í felagnum við meiri enn 20% av atkvøðunum.

§ 11 í viðtøkum felagsins er soljóðandi:

*"Hvør partaeigari hevur rætt til at møta á aðalfundinum, um viðkomandi í seinasta lagi 5 dagar frammanundan aðalfundinum hevur biðið felagið um atgongumerki.*

*Atkvøðurætt á aðalfundinum hava partaeigarar, sum í seinasta lagi 5 dagar undan aðalfundinum hava biðið felagið um atgongumerki og atkvøðuseðil.*

*Partaeigari kann skrivliga geva øðrum persóni fulltrú til at fara á fund og greiða atkvøðu hansara vegna.*

*Atgongd til aðalfundin hava harumframt fjølmiðlarnir."*

Felagið hevur kosið sær Eik Banki P/F til kontoførandi peningastovn og kunnu parteigarar felagsins venda sær til henda peningastovn á adressuni Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn ella á heimasíðuni www.eik.fo ella á telefon nummar + 298 348 000 fyri at útinna fíggjarligu rættindi síni í felagnum.

***P/F Atlantic Petroleum***
***Nevndin***

Atlantic Petroleum